# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg havi biðið sambúgva mín, Francois Hollande, flyta frá mær, og vit eru samd um tað*

*(Ségolene Royal)*

# Sjey skúlabørn doyðu í NATO-loftálopi

**Altjóða herleiðslan í Afghanistan leggur al-Qaeda undir at fjala seg ímillum sivilfólk í moskum og skúlum**



*Aftan á ta ógvusligu bumbuatsóknina kravdu illir afghanar, at teir amerikonsku hermenninir skulu fara av landinum*

Fleiri fólk og teirra millum sjey børn doyðu, tá flogfør hjá altjóða ISAF-herliðinum í Afghanistan bumbaðu eina støð hjá al-Qaeda leygarkvøldið. Ein talsmaður hjá ISAF segði aftan á álopið, at fleiri vápnaðir menn vóru millum tey deyðu, men at álopið tíverri eisini hevði kostað sjey børnum lívið.

-Hetta er enn eitt dømi um, at al-Qaeda brúkar eina mosku og ósek sivilfólk til verju, segði talsmaðurin hjá teimum útlendsku herdeildunum.

NATO-keldur søgdu í gjár, at tey sjey børnini, sum doyðu í loftálopinum, vóru seks og sjey ára gomul, og at tey gingu í einum koranskúla. Sambært keldunum er tað rættiliga vanligt, at børn í Afghanistan fara í koranskúla, tá tey eru um seks ára aldur.

Nakrar tímar undan loftálopinum brast ein ógvuliga sterk bumba í einum løgreglubussi í høvuðsstaðnum Kabul. Atsóknin, sum var tann ringasta síðani innrásina fyri seks árum síðani, kostaði meiri enn 30 løgreglumonnum lívið.

Teir seinastu mánaðarnar hava meiri enn 120 sivilir afghanar latið lív í álopum hjá teimum útlendsku herdeildunum. Nógvir afghanar eru sera misnøgdir við framferðina hjá teimum útlendsku hermonnunum, og í seinastuni hava fleiri kravgongur verið, har fólk hava kravt Hamid Karzai, forseta frá og teir amerikonsku hermenninar av landinum.

# Hótta aftur við at drepa

**-Verða krøv okkara ikki gingin á møti, fara vit at gleða Guð við at avrætta bretska tíðindamannin, sigur Islamski Herurin**

-Um nakrar fáar tímar verður Alan Johnston latin leysur.

Tað vóru boðini frá leiðsluni í palestinska felagsskapinum Hamas í gjár, men seinni boðaðu burturflytarar hansara frá, at hetta var í hvussu er ikki teirra ætlan.

- Batnar støða okkara ikki, og verða krøv okkara ikki gingin á møti, fara vit at gleða Guð við at taka bretska tíðindamannin av døgum, segði talsmaðurin hjá Islamska Herinum við arabiska sjónvarpið Al Jazeera.

Islamski Herurin burturflutti BBC-tíðindamannin Alan Johnston í Gaza býi tann 12. mars. Bretsku myndugleikarnir hava gjørt greitt, at teir samráðast ikki við burturflytarar, men bæði BBC og týðandi einstaklingar hava fleiri ferðir biðið Islamska Herin lata tíðindamannin leysan.

Islamski Herurin hevur fyrr sagt, at Alan Johnston verður ikki latin leysur, fyrr enn allir muslimskir fangar í Bretlandi verða latnir leysir. Eygleiðarar siga tó, at kravið umfatar serstakliga jordanan Abu Qatada, sum situr fongslaður í Bretlandi, skuldsettur fyri at hava samband við al-Qaeda.



*BBC-tíðindamaðurin, Alan Johnston, varð burturfluttur á Grækarismessu*

## STUTT SAGT

### Flýddu í lítlum báti

Fýra fólk úr Norðurkorea, eini hjún við tveimum vaksnum synum, fóru um vikuskiftið úr Japan til Suðurkorea. Japonsku fjølmiðlarnir siga, at tey fýra fólkini flýddu úr Norðurkorea í einum lítlum báti, og eftir seks dagar á sjónum sluppu tey upp á land í Japan. Tey fýra hava greitt frá, at tey flýddu burtur úr fátækradøminum í Norðurkorea, og tey hava nú søkt um friðskjól í Suðurkorea. Suðurkoreonsku fjølmiðlarnir hava gjørt lítið burtur úr tilburðinum, og tað kemst helst av, at avvarðandi hjá fólki, sum flýggja úr Norðurkorea, verða ofta revsað, skrivar AP.

### Generalur tikin

Fyrrverandi serbiski generalurin Vlastimir Djordevic, sum er skuldsettur fyri krígsbrotsverk í borgarakrígnum í Kosovo í nítiárunum, er tikin í Montenegro. Sum skilst hevði generalurin fjalt seg í Montenegro, men samstarv millum myndugleikarnar har og í Serbia gjørdi, at hann bleiv avdúkaður.Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia heldur, at Djordevic flýddi til Russlands í 2001, eftir at fleiri hópgravir vóru komnar undan kavi í Kosovo. Í borgarakrígnum var hann trúgvur stuðul hjá táverandi serbiska leiðaranum, Slobodan Milosevic.

### Nýggjur flokkur

Tá týskarar fara manna samveldisdagin næstu ferð, verður ein nýggjur flokkur á atkvøðuseðlunum. Die Linke, ið sum navnið sigur er ein vinstraflokkur, er ein samanrenning millum gamla sosialistaflokkin í DDR og sosialdemokratiska mótmælisflokkin WASG. Formaðurin í nýggja flokkinum, Oscar Lafontaine, segði í gjár, at Die Linke kann fáa næstan 25 prosent av atkvøðunum næstu ferð. Krígsbrotsmannadómstólurin fyri gamla Jugoslavia heldur, at Djordevic flýddi til Russlands í 2001, eftir at fleiri hópgravir vóru komnar undan kavi í Kosovo. Í borgarakrígnum var hann trúgvur stuðul hjá táverandi serbiska leiðaranum, Slobodan Milosevic.